Viðmerking:

# Søguligt landsstýri og samgonguflokkar

Tað fer nú at líða at tveimum árum hjá hesum landsstýrinum. Uttan at fara niður í smálutir, altíð er okkurt at finnast at, treyðugt so, og leggjast má heldur ikki ov nógv fyri, eigur tað stóra tøkk uppiborna bæði fyri tað, tað hevur gjørt í dagligum politikki, sum mest snýr seg um nútíðina, og tað megnar arbeiði, tað hevur gjørt á stjórnmálaøkinum. Tú kanst kanska siga, at heimastýrislógin so dánt kundi brúkast fyri 25 árum síðani, tí okkara umheimur tá var bara Danmørk, men við tí við ferð vaksandi alheimsgerðini, og at Danmark nú hevur mist so stórt vald á egnum øki til ES, ger tað alneyðugt at fáa skipað viðurskifti við Danmark, evsta vald. (Sjálvur havi eg altíð, og vil altíð stremba eftir, at Føroyar verða ein republik. Um tann vanlukkan fyri okkum skuldi hent, at andstøðan vinnur, verður arbeitt víðari við hesum máli).

Eins og øll minnast Sjálvstýrislandsstýrið, verða tit minst, hóast tit og tað eru ósambarulig. Tit fevna um so ótrúliga nógv meira enn tað.

Einki landsstýri hevur fingið so ómilda viðferð, her hugsi eg ikki um andstøðuflokkarnar, teir hava bara roynt at jolla aftaná. Er tað meir enn hálvt ár síðan at javnaðarflokkurin kom við sínum uppskoti, og longu nú kennist tað gamalt. Tað ótrúliga er hent, at sambandsflokkurin eisini hevur flutt seg, ja, kanska lagt javnaðarflokkin aftur um bak. Alt hetta er landsstýrinum fyri at takka. Eitt ótal av gomlum spurningum og svarum og hugtøkum eru løgd aftur um bak. Tað klárnar alt meira og meira fyri fleir og fleir. Nøkur gomul hugtøk ella rættari brigsl síggjast og hoyrast enn, t.d. »at Karsten Hansen, sum er danskt løntur tænastumaður, kann loyva sær…« Hetta hevur verið lagið, men tað mennir ongan demokratiskan hugburð, tvørtur ímóti.

Alt møguligt sum ómøguligt úr dagsins málum hevur verið sett í samband við »Fullveldismálið« – »Hetta eru tey, ið skulu taka fullveldi«, »Hatta verður gjørt bara fyri at tey skulu fáa fullveldi«, »Eru tað hesi, sum skulu stýra í einum fullveldi?« »Skulu vit hava fullveldi, so mugu vit bæði hetta og hatta, t.d. spara« (skulu vit ikki altíð spara?).

Hugburðurin, sum liggur aftanfyri, er, at bara vit eru saman við dønum, so tørvar okkum einki at gera, tað orna danir fyri okkum. Hetta prátið sigur mær meira enn nakað annað, at vit skjótast mugu fáa skipað viðurskifti við danir. Púrasta gloymdur er 6. okt. 1992. Og fólk hava ikki varnast ella lata sum um tey ikki vita tað, at veldugar broytingar eru farnar fram í danska samfelagnum og hugsanini um samfelagið. EIsini teir tosa um niðurslitið heilsu- og skúlaverk. Posthús niðurløgd í túsundatali. Post Danmark skal kanska eigast av fronskum felagi o.s.fr. Ymiskt sum fólk vilja hava annarleiðis, svara danskir politikarar ofta við at vísa til ES fyriskipanir. Tað er stóra punktummið. Privatiseringin er ikki tálmað undir Nyrup, tvørtur ímóti. At formaður javnaðarfloksins í Føroyum, sum enntá er fólkatingsmaður, tosar sum um at hesin veruleikin ikki var til, er ótrúligt. Fyri ikki at brúka sterkari orð.



Hetta landsstýrið fór sera væl fyrireikað at samráðast, men hondina á hjartað, hvør hevði væntað eina tílíka mótstøðu (sterk orð hava verið brúkt um hana av sera ymsum fólkum). Føroyingar vóru bláoygdir. Teir vóru dulir og blindir. Teir vildu ikki síggja veruleikan í eyguni. Er tað nakar føroyingur, sum nú ivast í, at »Hin føroyski javnaðarflokkurin« visti meira enn vanligi veljarin. Dømini eru fleiri. Hin etniska útrokningin var stórtíðindi allastaðni. Dimmalætting skrivaði við stórum stavum á forsíðuni: »Kalla etniska útrokning skammleysa og órímiliga«. Blaðið hjá »Hinum føroyska javnaðarflokkinum« tagdi stórtíðindini burtur. Høvdu teir hoyrt tey fyrr? Áðrenn fundin førdu teir seg fram við, at teir høvdu ein »realistiskan politikk«. Realisman var, sóu vit nú, ikki at føra nakað fram, sum kom tvørt fyri tey donsku áhugamálini. Og so verður aftur full drøn sett á at fáa føroyingar at tiga og takka fyri tað, danir vilja geva okkum.

Tit, samgonguflokkarnir og landsstýrið, arbeiða við einum stórmáli, meira enn hundrað ára gamalt, sum ber av øllum. Slakið ikki, viknið ei heldur. Fleiri og fleiri koma í tykkara part. Komandi ættarlið vilja takka tykkum.

**Steinbjørn B. Jacobsen**

---

### Tað er jú eitt værri skil

Til marknaðarføring eg brúki jú tey
má mínari troyggju stendur eitt hey
alt endaði í eini stórari gølu
og børnini nýtt til søluvøru.

Eg valdi at fara til Tummas Dam
at keypa mær klæði, har møtti eg Sam
um tú keypir tær klæði her
rokningin oman á býráðið fer.

Eitt ordans kvett eg gjørdi jú har
og hvørt eitt eyga í býnum sær
á klæðum mínum stendur full stopp
og onkur á býráðnum fekk propp.

Tak tær tað ikki alt ov nær
tað í bløðunum tú sær
okkurt skulu tey skriva
fyri at vit skulu yvirliva.

Forkvinna í Sosialu nevnd har er
hendan heilsanin til hana fer
vit bíða eftir eini umbering
men hetta endar nokk bara við eini kritisering.

Nú hesa yrking eg enda vil
nei, bíða mær eitt lítið bil
til allar dagrøktarar eg eydnu senda vil
og vóni at síggja nógv børn við tykkara lið.

**Eydnusæla**

# Hvat er at samráðast

Tað ljóðar bæði óskyldugt og pent, tá hin blíði Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, fríggjakvøldið 31. mars í Sørvági segði við útvarpsmannin, at hann vónar, at Føroya Lærarafelag vil samráðast – tí teir eru klárir.

Føroya Lærarafelag hevur roynt og roynt at samráðast saíðan 1. mai 1999. Tað var Føroya Lærarafelag, ið legði samráðingaruppskot á borðið 31. mars 1999, so sum høvuðsavtalan fyriskrivar meðan onki kom frá Fíggjarmálastýrinum.

Tá 8 dagar vóru farnir út um tíðina, tá samráðingarnar sambært høvuðsavtaluni skuldu havt byrjað, mátti Føroya Lærarafelag gera vart við seg aftur.

Á fyrsta fundinum, ef tir at hava havt uppleggið frá Føroya Lærarafelag í ein mánað, møtti Fíggjarmálastýrið við ongum, men segði seg vilja taka støðu til



samráðingaruppleggið hjá Føroya Lærarafelag so hvørt.

At sita við buktini og báðum endum og mest nýta tað stutta orðið NEI hevur lagt stórar forðingar fyri at samráðast.

Aðaltreytin fyri at tveir partar kunnu samráðast er, at partarnir eru reellir og realistiskir.

Tá Fíggjarmálastýrið kemur út alment við rangari útroknan av tímatali hjá føroyskum lærarum, so talar hetta longu fyri seg. Hvussu kanst tú samráðast við slík fólk. Tú kemur onga leið, tað hevur tíðin víst. Hvat við at skifta hesi fólk út?

Fíggjarmálastýrið hevur læst seg fast í arbeiðstíð læraranna, og nýtir hesa sum undanførslu fyri broytingum í nýggju fólkaskúlalógini.

Tað verður sagt, at lærarar hava ivaleyst av tíð tilyvirs ella óbeinleiðis sagt – tað eru lærarar, ið ikki nýta sína fullu arbeiðstíð til tað teir skulu, men nýta hana til annað.

Um arbeiðsgevarin veit um slík dømi, átti hann at tala at og í ringasta føri sagt fólki upp, ið nýta tílíkt arbeiðslag.

Tað er skeivt av Fíggjarmálastýrinum at nýta slíkan norm sum grundarlag fyri allar lærarar.

Skulu vit hava ein dygdargóðan fólkaskúla, so mugu skúlaleiðslurnar styrkjast, so tær fáa tíð og umstøður at ansa eftir, at fólkaskúlalógarinnar arbeiðið verður gjørt, so sum tað skal.

Og sjálvandi má tann einstaki lærarin eisini fáa ta tíð og tær umstøður, ið krevjast, fyri at kunna útinna lógarinnar krøv í verki.

**Og tað er hetta, Føroya Lærarafelag vil!**

Øll fakfeløg krevja rættvísa løn og røttu arbeiðsumstøður. Men hvussu nógv fakfeløg hava samstundis fingið lagt eina lóg á herðarnar, sum arbeiðsgevarin ikki vil »viðurkenna«??

**Petur Sigurd Rasmussen**

---

# Stór Amnesty-framsýning á Torginum í SMS

Amnesty International Føroya Deild hevur hesa vikuna eina framsýning á torginum í SMS, har ymsir partar av arbeiðinum hjá limum felagsins verður sýnt fram.

Teir tríggir bólkarnir hjá Amnesty í Føroyum greiða frá arbeiði sínum, og teir greiða eisini frá teimum fangunum, sum teir arbeiða við, samstundis sum teir heita á fólk um at senda brøv til avvarðandi myndugleikar fyri at leggja trýst á teir at lata fangarnar leysar.

Urgent Action ella Snarmálsnetið hjá Amnesty International Føroya Deild greiðir eisini frá arbeiði sínum, og í hesum partinum av framsýningini verða m.a. fleiri svar, sum eru komin uppá brøv, sum limir í føroyska Snarmálsnetinum hava sent síðstu árini, víst fram.

Um allan heim eru amnestylimir í hesum døgum farnir undir at senda áheitanir til stjórnina í Saudi Arabia, fyri at fáa hana at betra um syndarligu mannarættindastøðuna í landinum. Eisini føroyska deildin hjá Amnesty International tekur lut í hesum átakinum, og greitt verður frá hesum á framsýningini. Brøv liggja klár, sum fólk kunnu senda til Saudi Arabia.

Deyðarevsingin er enn sum áður eitt tað grovasta brotið ímóti mannarættindunum, og hóast stór framstig eru gjørd síðstu árini við at avtaka deyðarevsingina um allan heim, so er enn langt eftir á mál. Amnesty fer á framsýningini at royna at fáa so nógv sum gjørligt at skriva undir uppá eina áheitan á allar heimsins stjórnir um at stegða deyðarevsingini beinanvegin. Hetta er eitt átak, sum Sant' Egidio felagsskapurin í Rom hevur tikið stig til. Síðani hava fleiri aðrir mannarættindafelagsskapir tikið undir við áheitanini, og seinast gjørt varð upp, vóru fleiri enn 2 milliónir undirskriftir savnaðar. Men tær verða vónandi uppaftur nógv fleiri, tá tær verða handaðar ST-aðalskrivaranum Mannarættindadagin 10. desember í ár. Amnesty International Føroya Deild vónar, at eisini føroyingar í hópatali fara at skriva undir hesa áheitanina.

Sjálvandi verður eisini greitt meira alment frá um felagið Amnesty International, og høvið verður eisini hjá fólki at tekna seg sum lim í felagnum.

Framsýningin endar við stórum og forkunnugum køkutombola á Torginum í SMS fríggjadagin og leygardagin.



síða 17
Eg havi havt tvær læruríkar vikur
síða 18 og 19
Ein Kul Rót
síða 20
Iron Maiden møta við sterkastu mabnning
síða 21
Hitlistar og svara so!
baksíðan
Fløguumæli